gult12 cyan12 magenta12 svart12



FISKIVINNUTÍÐINDI

# Føroyingar hittast í London

SAMKOMA
*Jan Müller*

Aftur í ár verður samkoma og hugnaløta í donsku kirkjuni í London fyri føroyingar, sum búgva í Bretlandi. Tiltakið verður sunnudagin 6. mai. Vanlig gudstænasta verður klokkan 11 og har eru føroyingar vælkomnir sum altíð. Aftaná gudstænastuna verður fyrst drekkamunnur og køkur á skránni. Eftir tað verður borðreitt við Buffet Lunch.

Danska kirkjan liggur í St. Katharine´s Precinct, Regents Park, London NW1 4HH. Næstu undirgrundstøðirnar eru Camden Town, Northern Line og Great Portland Street, Circle Line. Stigtakararnir til samkomuna, sum eru fólkini í FISC biðja okkum siga frá, at tey, sum koma vi ð hýruvogni skulu siga, at tey skulu til St. Katharine´s Precinct, next to Cumberland Terrace.

Tey, sum vilja vera við, skulu boða frá til Marjun Joensen á telefon 020 8953 9920 ella á e-mail: marjoensen@aol.com

# Gongur ikki væl hjá Royal Greenland

Stóra felagið Royal Greenland er heimsins størsti virkari av rækjum úr køldum sjógvi og tað gongst væl at fiska rækjur. Men tað gongst ikki væl í sjálvari fyritøkuni. Í fjør hevið fyritøkan ein umseting upp á 3,5 milliardir krónur, men ársúrslitið var bert 11 milliónir danskar krónur.

Nevndin fyri Royal Greenland er ikki nøgd við úrslitið. Orsøkin sigst at vera, at rækjuvirkini á landi ganga illa og at kappingin er hørð frá verksmiðjutrolarum, sum pakka lidnar rækjur umborð.

Í 1999 og í fjør seldi felagið 95.589 tons av fiski. Umframt rækjur, so er krabbi og svartkalvi týdningarmiklar vørur. Men enn er felagið sterkt, eginkapitalurin er eina góða hálva milliard krónur.

# Stórur lemmar virkaðu fínt

Stóri írski trolarin »Atlantic Challenge« er júst komin aftur av fyrsta svartkjaftatúrinum við nýggjum íslendskum lemmum FLS 12 Poly-Ice frá Hampiðjunni. Teir høvdu fýra hál og togaðu samanlagt í 10 tímar og veiðan vá 1600 tons.

Steven McSharrey, skipari á Atlantic Challenge sigur við íslendsku vevsíðuna Interseafood.com, at lemmarnir royndust væl.

– Teir koma munandi betri út enn aðrir lemmar av somu stødd og tað svarar aftur bæði í skvering og minni oljunýtslu, sigur Atli Jósafatsson frá Hampiðjunni.

Lemmarnir eru 13 metur langir. Teir eru úr sterkum Weldox stáli, sum er léttari enn vanligt stál. Teir hála fimm tons hvør við 3,5 míla tóvferð.



*Mynd: Interseafood.com*



*Chr. í Grótinum fer her við fullari ferð suður gjøgnum Nólsoyarfjør fyrrapartin í gjár.*

*Mynd. Jens Kr. Vang*

# 35 svartkjaftaskip í føroyskum sjógvi

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Teir sigla sum aðrir sandgrabbarar á Fuglafjørð við tí einu lastini fyri og aðrari eftir, nótabátarnir Chr. í Grótinum og Krúnborg, Tróndur í Gøtu o.s.v.

Christian í Grótinum fóru suður gjøgnum Nólsoyarfjørð um 11 tíðina í gjár á veg á svartkjaftaleiðirnar í ein útsynning úr Munkinum í føroyskum sjógvi. Svartkjafturin stendur enn tættur og tað tekur slett ikki so langa tíð at fáa uppí. Hendan túrin hevði Chr. í Grótinum eisini fulla last. Teir løgdu væl yvir 2000 tons upp á Havsbrún.

Tróndur í Gøtu landaði mánadagin 2500 tons og Krúnborg liggur nú á Fuglafirði og verður landaður. Teir hava 2500 tons inni hendan túrin.

**Nógv skip á feltinum**

Nógv svartkjaftaskip eru á feltinum. Tað liggja heilir 19 russarar og toga eftir svartkjafti. Átta norðmenn eru eisini, tveir danskir svartkjaftatrolarar og ein franskur. Íslendingarnir eru ikki at síggja í føroyskum sjógvi í løtuni. Teir liggja vegna verkfall.

Norðmenninir hava longu veitt 39.000 tons av kvotuni, sum er upp á 47.000 tons. Teir verða helst lidnir við kvotuna í føroyskum sjógvi longu í hesi vikuni. Kvotan hjá russum er drúgvari og hon plagar at strekkja árið út. Donsku bátarnir og franski veiða av ES kvotuni.

Jón Sigurdsson er á veg til Íslands at landa. Hann tekur 900 tons og hevur fulla last. Hann skal landa á Fáskrúðsfjørðinum á Eysturlandinum. Tað er stytsta leið.

# Íslendingar tveita nógv útaftur

Seinasta fríggjadag varð ein kanning, ið stovnurin Gallup hevur gjørt millum íslendskar fiskimenn almannakunngjørd og úrslitið av hesi hevur skakað íslendingar. Íslendskir fiskimenn hava seinastu árini tveitt fisk útaftur fyri milliardir, serliga tosk, men eisini hýsu.

Tað hevur leingi verið illgruni um, at íslendingar tveita nógvan undirmálsfisk útaftur, men bæði bæði fiskimenn og reiðarar hava avsannað hetta.

Heitt var á Gallup í vetur um at gera eina kanning millum fiskimenn. Stovnurin fór gjølliga til verka, spurdi 2246 fiskimenn. Av hesum svaraðu 77 prosent. Allir teir spurdu svaraðu upp á 57 spurningar um útblaking av fiski og úrslitið fyriliggur nú í eini kanning sum fevnir um 70 síður.

Tað var íslendski fiskimálaráðharrin, Árni Mathiessen, sum kunngjørdi úrslitið.

Kanningin vísir, at eini 15.000 tons av tosku vóru útblakað í fjør og eini 5000 tons av hýsu.

Allir fiskimenninir, sum svaraðu søgdu, at teir kendu til trupulleikan við útblaking. Serliga nógv verður tveitt út av trolarum við botntroli, 43 prosent, síðan koma línubátarnir við 22 prosentum, garnabátarnir við 20 prosentum og flótitrolið við 14 prosentum.

Íslendingar nýta ikki fiskidagaskipan, men kvotuskipan og tá snýr tað seg um at fáa sum mest at stórum fiski í lastina, tí hesin gevur besta prísin.

**j.e.**

# Sealord, størsta fiskivinnufyritøka í Ný Sælandi

Samlaða kvotan av matfiski í Ný Sælandi er 670.000 tons og herav eigur stóra fyritøkan Sealord ein fjórðing. Størsti eigarin í Sealord er japanska fyritøkan Nippon Suisan Kaishan. Sealord eigur 25 skip og hesi kunnu fiska 148.000 tons. Tað er serliga hoki, sum skipini veiða, ein væl umtóktur matfiskur við hvítum fiski og sum er er at síggja allastaðni í frystidiskunum í Japan.

Ný Sæland hevur veldiga stórt fiskiøki. Landið er ikki stórt, men langt. Strandarlinjan er eins long og tann hjá USA. Ný Sæland er eitt undangonguland, tá tað snýr seg um at gagnnýta havið á einum burðardyggum grundarlagi.

Bátarnir hjá Sealord veiða á øllum dýpum og teir royna við troli, línu og verksmiðjutrolarum.

**j.e.**



gult13 cyan13 magenta13 svart13

# Gólvsølan

## 57 bátar seldu knappliga 18 tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 101 | Strandingur | lína | 695 |
| FD 102 | Bylgjan | snella | 181 |
| FD 131 | Høghamar | snella | 201 |
| FD 25 | Mascot | lína | 446 |
| FD 306 | Vesturland m/s | gørn | 806 |
| FD 316 | Annfríð | snella | 206 |
| FD 348 | Skoratindur | snella | 128 |
| FD 363 | Líðarbrúgv | snella | 546 |
| FD 367 | Báran | snella | 86 |
| FD 386 | Slættiklettur | snella | 983 |
| FD 421 | Hjallur | snella | 415 |
| FD 437 | Munkurin 3 | snella | 187 |
| FD 460 | Safir | snella | 348 |
| FD 464 | Sæborg | botntrol | 112 |
| FD 492 | Klettur | snella | 220 |
| FD 954 | Vørðan | snella | 327 |
| FD 984 | Tvey systkin | snella | 119 |
| FD 992 | Kúrberg | snella | 30 |
| FD1140 | Eyðin | snella | 523 |
| KG 92 | Øldan | snella | 458 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 58 |
| TG 347 | Knúkin | snella | 87 |
| TG 397 | Kvikk | snella | 220 |
| TG 495 | Egil m | snella | 229 |
| TG 508 | Magnhild | snella | 45 |
| TG 523 | Sóley | snella | 119 |
| TG 60 | Sjófarið | snella | 471 |
| TG 620 | Bergur II | snella | 251 |
| TG 731 | Annie m/b | snella | 375 |
| TG 802 | Brattanes | snella | 80 |
| TG 95 | Fløtunes | snella | 88 |
| TN 149 | Ørvur | snella | 371 |
| TN 23 | Espingur | snella | 2.478 |
| TN 417 | Gunbjartur | snella | 170 |
| TN 844 | Brandur | snella | 382 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 168 |
| TN 897 | Maj-N | snella | 159 |
| VA | Kelvin | snella | 177 |
| VA | Lómur | snella | 177 |
| VA 105 | Barið | snella | 46 |
| VA 135 | Havfrúgvin | snella | 266 |
| VA 141 | Álkuklettur m/b | snella | 783 |
| VA 190 | Sjóberið | snella | 382 |
| VA 213 | Leitistangi | snella | 465 |
| VA 245 | Sunnvá | snella | 69 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| VA 294 | Nestangi | snella | 445 |
| VA 310 | Streymnes | snella | 400 |
| VA 324 | Skarvur | snella | 205 |
| VA 327 | Fortuna m/b | snella | 189 |
| VA 34 | Dunga hans m/b | snella | 163 |
| VA 352 | Petsy | snella | 167 |
| VA 66 | Gunnvá | snella | 141 |
| VA 81 | Gutta Jógvan | snella | 220 |
| VA 82 | Raðnes | snella | 164 |
| VN 156 | Hanus á Bø | snella | 265 |
| VN 496 | Reyni | snella | 116 |
| VN 513 | Klettur | snella | 150 |

| Vørunavn | kilo |
|---|---|
| Annað | 12 |
| Blálonga 0 | 61 |
| Blálonga 2&3 | 22 |
| Brosma 0 | 56 |
| Hýsa 1 | 24 |
| Hýsa 2 | 18 |
| Hýsa 3 | 39 |
| Hýsa 4 | 451 |
| Havtaska 0 | 51 |
| Hvítingur 0 | 101 |
| Kalvi 2 | 412 |
| Kalvi 3 | 310 |
| Kalvi 4 | 21 |
| Kongafiskur 0 | 84 |
| Longa 0 | 46 |
| Reyðsprøka 0 | 10 |
| Skøta | 111 |
| Skrubba | 2 |
| Steinbítur | 156 |
| Toskarogn | 8 |
| Toskur 1 | 85 |
| Toskur 2 | 458 |
| Toskur 3 | 4.754 |
| Toskur 4 | 6.552 |
| Toskur 5 | 3.110 |
| Upsi 0 | 276 |
| Upsi 2 | 60 |
| Upsi 3 | 156 |
| Upsi 4 | 135 |

# Meiri pengar til skúlan

TÍÐINDASKRIV
*v/ Føroya Lærarafelag Elsa Birgitta P. Petersen, formaður*

Føroya Lærarafelag fegnast um, at Løgtingið í dag hevur samtykt at hækka játtanina til at seta fólkaskúlalógina í verk.

Føroya Lærarafelag ber kortini ótta fyri, at játtanin ikki fer at røkka, og heldur tí í grundregluni framvegis fast við, at talan kann verða um sáttmálabrot og fer at fylgja væl við, hvussu tímajáttanin til ymisku skúlarnar fer at síggja út skúlaárið 2001/2002. Røkkur upphæddin ikki, verða tað næmingarnir og lærararnir, sum fara at svíða fyri, at myndugleikarnir ikki játtaðu tað, sum teir vistu, at sáttmálin frá 30. apríl 2000 fór at kosta.

Føroya Lærarafelag hevur í dag gjørt av, at biðja Fíggjarmálastýrið um seming sbrt. grein 11 í Høvuðsavtaluni.



*Savnsmynd*




*Framhald av síðu 8*

seg m. a. um, at "tað gongur ikki dagur frá Guði, uttan at Jóannes Eidesgaard fær onkra skarnbyttu oman yvir seg". Hevði ynskt, at bæði dagarnir og skarnbytturnar vóru munandi fleiri í tali. Yvirhøvur undrar tað meg stórliga, at føroyskir fjølmiðlar ikki hava sett Jóannesi Eidesgaard knívin á barkan í hesum sambandi, og at meira rumbul ikki hevur verið í. Hvar aðrastaðni í verðini hevði ein floksformaður sloppið væl frá so groteskum úttalilsi, uttan møguliga á Cuba og í Norðurkorea? Hugsið tykkum til, um hetta hevði hent t. d. í Danmark! Hvat er tað fyri pressa, ið tit hava harheima?

Tískil er ikki at vænta, at Eidesgaard missir tingsessin (sum Albert Isfeldt so skilagott mælir til í Sosialinum 19. Apríl). Í einum landi, har neyðtøkumenn kunnu gerast politiskir martyrar, skal helst meira til at koyra løgtingsmenn úr sessinum enn grov úttalilsir.

Hinvegin ivist eg ikki í, at mong hampafólk eru í Javnaðarflokkinum. Væl eru tey von við buldrutar floksformenn. Men er nøkur sum helst skomm skapt í teimum, og eru tey ikki kemiskt reinsaði fyri sjálvkritikk og árræði, skifta tey Eidesgaard út í stundini og velja sær eitt meira siðiligt og mentað umboð. Lítið gott er í at velja, men við hetta lag er væl ein og hvør broyting ein broyting til tað betra. Við hasum formanninum er flokkurin ikki førur fyri at fara í Landsstýrið og so slettis ikki at umboða Føroyar úteftir.

Apotekini í Føroyum kundu eisini prentað úttalilsið hjá Jóannesi Eidesgaard á smáar lepar og selt teir sum spýggimiðil.

**Munur á lorti og pannikakum**

Hetta gevur mær eisini ábendingar um, hví Jóannes Eidesgaard, Atli Dam og adrir javnaðarmenn eru so sansaleyst í øðini inn á Høgna Hoydal. Nú gongur sjón fyri søgn: teir røkka jú ikki Høgna til øklarnar, hvørki sum politikarar, retorikarar ella mentamenn. Her er snøgt sagt munur á lorti og pannikakum, og tí tí ljósinum vísa teir seg sum teir verbalu og politisku gatudreingir, sum teir í veruleikanum eru. Er tað tann ómegdin, ið nívir?

Tí uttan mun um vit eru politiskt ósamd við sitandi landsstýri, og uttan mun til hvat andstøðan pástendur, so hevur hetta landsstýrið bøtt munandi um umdømið hjá føroyingum burturi og heima, givið okkum sjálvsvirðingina aftur og fingið okkum at bera høvdið høgt. Mangan kunnu danskir fjølmiðlar vera á gosi, men nú viðgera teir so av illum tað ið landsstýrið sigur, og ikki sum fyrr, rukkutúrarnar. Hetta er hóast alt eitt stórt framstig.

Skuldi eitt sum Eidesgaard nakrantíð gjørst løgmaður, hevði tað skatt okkara umdømi í ólukkumáta. So verður aftur pínligt at vera føroyingur. Tá ið politikarar fara uttanlands í dag, er ikki nóg mikið at teir duga at eta við knívi og gafli. Teir eisini duga at málbera seg sum fólk. Millum annað!

Sum svenskarar taka til: "Det är skillnad på talare och neandertalare".